# Stiftsfulltrúi

Eitt spennandi og avbjóðandi starv sum stiftsfulltrúi við Stiftsstjórn Føroya er leyst at seta frá 1. august 2007.

Umsøkjarin skal vera løgfrøðingur ella hava aðra samfelagsvísindaliga ella fyrisitingarfrøðiliga útbúgving við almennum rætti og fyrisitingarrætti.

Í samstarvi við stiftsstjórnina skipar og leiðir stiftsfulltrúin dagliga arbeiðið á stiftsumsitingini og er skrivari hjá stiftsstjórnini. Hann ráðgevur eisini biskupi í málum, sum viðvíkja embætisrøkt prestanna, kirkjuráðsvali, próstadømisráðsvali, bispavali, kirkjubókaføring, nýtslu av kirkjum v.m.

Fólkakirkjan verður ætlandi yvirtikin á Ólavsøku, og tann, ið settur verður í starvið, kann tí vænta, at stórar, nýggjar og spennandi uppgávur eru fyri framman, eitt nú at vera við í arbeiðinum at tilevna føroyskar lógir og kunngerðir á kirkjuliga økinum.

Tann, ið verður settur, kemur í stóran mun at mynda starvið saman við biskupi, men má eisini kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum. Góður málsligur førleiki er ein fyrimunur.

Vit ynskja ein starvsfelaga, ið hevur góð samstarvsevni og hug at samskifta, og sum sær møguleikar heldur enn forðingar.

Starvið verður sett og lønt eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsókn við gjølligum upplýsingum um útbúgving og yrki higartil skulu saman við próvskjølum sendast Føroya Stiftsstjórn, J. Paturssonargøta 20, Postrúm 8, 110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Hans Jacob Joensen, tlf. 31 19 95.

Umsóknarfreistin er úti fríggjadagin 15. juni 2007 kl. 12.000.

**Føroya Stiftsstjórn**
J. Paturssonargøta 20
Postrúm 8
110 Tórshavn

# KAPPRÍÐING

Kappríðing verður við Leynavatn leygardagin 16. juni kl. 15.00.

Tilmelding seinast hóskvøldið 14. juni kl. 19.00.

**Ring: 219098 – 224343 – 228833**




VR BILAR

# Goymslulærlingur

VR-Bilar søkir eftir Goymslulærlingi (Kvinna/Maður) til eykalutagoymsluna, at byrja skjótast til ber.

Umsøkjarin skal helst hava FHS og fyrimunur er um umsøkjarin hevur royndir at arbeiða við teldum. Umsøkjarin skal vera fyrikomandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Skriftlig umsókn skal sendast til:

**VR-Bilar Sp/f**
Hoyvíksvegur 61
Postsmoga 3130
FO-100 Tórshavn

Meir fæst at vit, við at venda sær til Marna Olsen á telefon 215 099.

**VR-Bilar** selur bilar av merkinum Volvo, Renault og Chevrolet. Afturat goymsluni er eisini bilasøla og persónbilaverkstaður. Á VR-Bilum starvast í løtuni 14 fólk

VOLVO · CHEVROLET · RENAULT

## TRIV SP/F

# Søkir eftir fólki til verkstaðin

**Arbeiðið umfatar:**
Umvæling av landbúnaðarmaskinum, so sum traktorar, sláimaskinur, ballupressur o.l.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur viðkomandi útbúgving s.s. maskinmeistari, maskinsmiður ella bilmek. Hetta er tó eingin treyt, tí hevur tú áhuga í og kunnleika til motorar og maskinur, hava vit eisini brúk fyri tær.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg ella hevur tú spurningar til starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við okkum ella senda okkum, innan eina viku, eina umsókn við møguligum prógvum og viðmælum.

**Triv** er ein 22 ára gomul fyritøka, sum selur flestu merkir av landbúnaðarmaskinum

Triv
Heygsvegur 30
P.O. Boks 197
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 69 10
Fax 31 81 19

RUNAVÍKAR kommunuskúli
Glyvravegur 10A · FO 625 Glyvrar
Tlf. 447331 · fax 447767
t-postur: rks@skulin.fo

# Lærarastørv í Runavíkar kommunuskúla

Til skúlaárið 2007/08 verður søkt eftir 9 lærarum at byrja 1. august 2007.

- 3 lærarum í fast starv
- 5 lærarum í tíðaravmarkað fulltíðarstarv skúlaárið 2007/08 fyri lærarar í farloyvi
- 1 lærara í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2007/08 (u.l. 12-14 tímar) fyri tímaniðurskurð hjá lærarum

Søkt verður eftir lærarum, sum kunnu lesa tímar í m.a. Innskúlingini, miðdeildini, framhaldsdeildini og serstovunum.

Umsøkjararnir mugu hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinaøkjum: máli støddfrøði, ítrótti, kunningarlærugreinunum, handaligu lærugreinunum, bókasavn og at arbeiða við nemingum við breki.

**Vit vænta, at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og ert hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vilt vera við til at áhaldandi at menna skúlan

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið eru allir skúlarnir, sum hoyra til Runavíkar kommunuskúla. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Størvini eru treytað av, at tímajáttanin heldur.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum ummælum skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 15. juni 2006, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið frá Ásmund Lamhauge, skúlastjóra á tlf. 447331 & 217331 ella Duritu P. Joensen, varaskúlastjóra á tlf. 447331 & 221363.

**Runavíkar kommunuskúli** hevur komandi skúlaár um 463 næmingar og um 55 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/rks

Lesið Sosialin

# Yamaha skutari til sølu

Yamaha Neos skutari til sølu, 1 ára gamal, koyrt 300 km. Nýprísur kr. 21.000,00.

Nærri upplýsingar fáast frá

**ADVOKATSKRIVSTOVUNI**
Tel. 311145 · frp@jura.fo · bar@jura.fo